# Útróðrarbáturin Adrian aftur í Noregi



*Útróðrarbáturin, Adrian, er bygdur í Noregi í 1986, keyptur til Føroya í 2000, og nú er hann so aftur í Noregi*

**Í Føroyum hevur hann verið heimahoyrandi á Strondum og í Froðba seinastu fýra árini**

BÁTASØLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Útróðrarbáturin, Adrian, sum Sp/f Accord í Froðba í seinastuni hevur átt, er nú seldur til Noregs, har hann varð bygdur í 1986.

Báturin varð keyptur úr Noregi til Føroya í 2000, og var tá heimahoyrandi á Strondum undir navninum, Marianna II.

Í 2003 keyptu froðbingar bátin og góvu honum navnið, Adrian.

Adrian er 14,99 metrar langur og 5,82 metrar breiður. Hann hevur ein nýggjan høvuðsmotor sum er ársgamal. Hjálpimaskinan er frá 2002 og sonevnda BFG-línuskipanin, sum er til 20.000 húkar, er frá 2000.

Tað er skipsmeklaravirkið MARETEC á Argjum, sum hevur skipað fyri søluni av útróðrarbátinum til Noregs.

# Palli Lamhauge nýggjan bát



*Soleiðis sær nýggi báturin hjá Palla Lamhauge út. Báturin, sum ætlandi kemur í mai, kann sigla við 50 ferðafólkum*

Palli Lamhauge í Vestmanna skal hava nýggjan bát til sigling við ferðafólki.

Á myndini síggja vit nýggja og snotuliga bátin hjá honum, sum ætlandi kemur higar til lands í mai 2005.

Nýggi báturin hjá Palla Lamhauge kann sigla við 50 ferðafólkum í senn.

-v.

# Heri Thomsen keypt farmaskip

**Eitt dóttirfelag hjá P/F Hera Thomsen í Gøtu hevur keypt farmaskipið, Nordland, úr Noregi**

FARMASKIP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Dóttirfelagið hjá P/F Hera Thomsen í Gøtu, sum eitur Norlink, hevur keypt norska farmaskipið, Nordland.

Skipið kemur til Føroya í januar, og ætlanin hjá Norlink er, at skipið skal sigla millum Føroyar og Danmark.

Skipsmeklaravirkið MARETEC á Argjum hevur skipað fyri søluni av skipinum.

Farmaskipið, Nordland, er bygt í Noregi í 1976 og er longt í 1982.

Skipið er 87 metrar langt og 14,5 metrar breitt. Tað lastar stívliga 1700 tons.

Nordland hevur síðuportur og tekur einar 2000 plattar og 32 bingjur.




*Hetta er farmaskipið, sum dóttirfelagið, Norlink hjá P/F Hera Thomsen í Gøtu hevur keypt úr Noregi. Skipið fer ætlandi at sigla millum Føroyar og Danmark*

Høvuðsmaskinan er ein B&W Alpha 3432 hk., og ferðin liggur um stívliga 14 míl.

# Páskaferð til Ísrael

**Í døgunum, 17.-30. mars komandi ár, verður skipað fyri føroyskum páskatúri til Ísraels, har fleiri av teimum kendu bíbilsku støðunum verða vitjað**

ÍSRAELSFERÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ísraelstúrurin er fyri øll, sum eru 17 ár og eldri, og ferðaleiðarar verða Frants Jensen og Kristian Martin Petersen.

Prísurin fyri ferðina liggur millum 12.500 og slakar 13.000 krónur fyri hvønn. Íroknað prísin er ferðingin báðar vegir, uppihald á góðum hotelli, allar útferðir, sum eru fevndar av skránni og hálv pensjón í mati.

Seinasta freist at tekna seg er sett til mánadagin, 10. januar 2005, og tekningin fer fram hjá ferðaleiðarunum.

Ein páskatúrur til heilaga landið er nakað serstakt.

Frants Jensen og Kristian Martin Petersen siga, at ferðalagið fyrst fer at vitja í nútímans býnum, Tel Aviv. Síðan verður koyrt norðureftir til Haifa og haðani til vakra og várgrøna økið við Genesaretvatnið, har Jesus var virkin og gjørdi fleiri av undrunum.

– Skírisdag verður farið niðan til Jerusalem, har vitjað verður á fleiri av teimum støðum, sum hava samband við tær fyrstu kristnu páskirnar.

Ferðaleiðararnir siga, at ætlanin er eisini at hitta kristnar palestinar á ferðini og hoyra um teirra viðurskifti í landinum.



*Frants Jensen og Kristian Martin Petersen skipa fyri ferð til Ísraels á páskum*

Lesið Sosialin - so eru tit við